# Popczynski er uppsagdur

Mánadagin skrivaðu vit her í blaðnum, at Krzysztof Popczynski eftir øllum at døma hekk í sera klønum trá. Tá hevði formaðurin í TB, Jóan Petur Olgarsson onga viðmerking, men í morgun váttar hann, at pólski venjarin er uppsagdur. Tað var í juli í fjør, at Krzysztof Popczynski og TB skrivaðu undir samstarvsavtalu. Henda avtala varð longd í oktober. – Málið var, at TB skuldi vinna seg uppaftur í bestu deildina, men nú kappingin er meiri enn hálvrunnin, sær tað svart út hjá TB. Liðið liggur nummar fýra í deildini, átta stig aftanfyri oddaliðið 07 Vestur.



# Hondbólturin skal á Balkan

Lutur er kastaður um, hvussu meistararnir í hondbólti skulu møtast í fyrsta umfari í EHF Cup. FM vinnarar eru Stjørnan hjá kvinnunum og Neistin hjá monnunum. Kvinnurnar úr Klaksvík skulu spæla ímóti HK Slovan Duslo Sala úr Slovakia, og menninir hjá Neistanum skulu spæla ímóti HC Lovcen-Cetinje úr Montenegro. Neistin skal spæla á útivølli 6. ella 7. september og á heimavølli 13. ella 14. september. Stjørnan skal spæla á heimavølli 6. ella 7. september og á útivølli 13. ella 14. september, veit Hondbóltssamband Føroya at siga í tíðindaskrivi.

# Katrin fyrireikar seg í Eysturríki



*Julianne Elander og Katrin Olsen (h.m). eru í hesum døgum á venjingarlegu í Eysturríki*

**– Vit koyra á, ljóðar tað úr Eysturríki, har Katrin Olsen er á venjingarlegu og fyrireikar seg til Olympisku Leikirnar**

**RÓGVING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

13.juli fóru Katrin Olsen, Julianne Elander og hinum donsku luttakarunum á Olympisku Leikunum. Har verður vant av øllum alvi, soleiðis at øll eru so væl fyri yvirhøvur gjørligt, tá leikirnir í Beijing byrjað í august.

Frá Katrini Olsen frætta vit, at møðin av álvara er farin at gera um seg.

– Men soleiðis skal tað vera og tað gongur framvegis væl hjá okkum, letur hon at. Katrin Olsen sipar til, at hon og Julianne Elander fríggjadagin vunnu klassiska seks kilometur teinin. Tær kappaðust við dupultscullarin hjá monnum og tiltikna gullfýrarin. – Vit vórðu sendar avstað fyrst, og tað gekk við rúkandi ferð, ljóðar tað frá Katrini í Eysturríki, sum saman við Julianne Elander megnaði at halda hinar báðar bátarnar aftanfyri seg allan teinin.

## Fáa kapping

Katrin Olsen greiðir frá, at tey nú fara undir at rógva stuttar teinar. Tá er tað ofta trupult at rógva móti mannfólkunum, tí hesir eru væl sterkari.

– Vit kunnu sjálvandi rógva sjálvar, men tað er altíð betri at hava onkran at togast við, heldur Katrin Olsen fyri. Tískil eru tær báðar, Julianne Elander og hon, ógvuliga fegnar um, at lættvektarin Jacob Armstrup kemur í dag fyri at rógva móti teimum, tað ið eftir er av venjingarleguni.

– Og harra-lættvekt singlescullara passar perfekt í ferð til damu-lættvekt dupultscullara. Jacob er serliga góður á stuttu teinunum, og tað er júst tað vit hava brúk fyri at venja, fortelur Katrin Olsen.

Hon letur annars at, at veðrið hevur verið gott. Tað hevur regna eitt sindur, men mest um næturnar og kvøldarnar, so tað hevur ikki ávirkað venjingarnar stórvegis.

# Renna ikki á Tórsbreyt

**Sunnudagin skipar Bragdið fyri rennikappingum. Hetta verður á Skálatrøð og ikki á Tórsbreyt, sum annars var ætlað**

**RENNING**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Tórsbreyt verður ikki liðug til ólavsøkurenningina*

Tey ætlaðu at renna á Tórsbreyt á ólavsøku – um hon verður liðug áðrenn ta tíð. Men tað verður hon ikki, staðfesti Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu

Fyri tveimum vikum síðani segði Heðin Mortensen við Sosialin, at tey arbeiddu dag sum nátt fyri at fáa rennibreytina lidna.

– Og hon skuldi verða liðug á ólavsøku, segði hann tá. Men hetta settu veðurgudarnir ein stoppara fyri, tí tað skal vera turt, tá seinasta hondin skal leggjast á Tórsbreyt.

## Renna á Skálatrøð

Nú verður so runnið á Skálatrøð í staðin. Byrjað verður kl. 18.30, tá vaksin renna 5 km.

Hóast øll tey vaksnu byrja í senn, so verður kappast í trimum aldursbólkum: vaksin fødd í 1991 ella fyrr, vaksin fødd í 1962 ella fyrr (veteranar), og vaksin fødd 1952 ella fyrr (superveteranar). Hetta er samstundis síðsta umfar av Grand Prix kappingini.

Børnini byrja at renna kl. 19.00 tá dreingir og gentur – 7 ár (fødd 2001 ella seinni). Síðani renna dreingir og gentur – 10 ár (fødd 1998-1999) sama tein.

Tey størru børnini skulu renna 3 ferð runt, t. e. 1200 m. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir og gentur – 13 ár (fødd 1995-1997) og dreingir og gentur – 17 ár (fødd 1991-1994).

# FM í olympisku kastigreinunum

Hvirlan úr Tórshavn skipar vegna FÍF fyri FM í teimum olympisku kastigreinunum komandi vikuskiftið. Kappingin verður á fyrsta sinni skipað yvir tveir dagar, har kappast verður í tveimum greinum hvønn dag.

Leygardagin 26. juli verður byrjað við diskuskasti og spjótkasti, meðan kappast verður í hamarkasti og kúlustoyti sunnudagin 27. juli. Kappast verður eftir altjóða reglum, har øll fyrst fáa trý kast og síðan fáa átta tey bestu trý afturat. Kappingarnar fara fram á kastivøllinum við Eysturskúlan, og verður byrja kl. 14.00 báðar dagarnar.

Kappingin er opin, tað vil siga at øll sum eru fødd í 1992 ella fyrr kunna luttaka. Fyrireikararnir siga, at tilmelding er á telefon 213775, og at tað gjarna kann gerast umvegis sms. Men tá verður heitt á fólk, um at skriva navn, árgang, møguligt felag, og kappingargreinar, ið kappast skal í. Seinasta freist at melda til er fríggjadagin 25. juli á middegi.